# Jól í Libanon og India

Hóast umleið 40% av teimum, sum búgva í Libanon eru alment kristin. Og hóast borgarakríggj hevur verið millum kristin og muslimar í landinum, so eru Jólini staðfest at verða almennir frídagar í Libanon. Tað er enntá soleiðis, at hóvligir muslimar halda jól saman við kristnum vinfólkum. Jólini eru eisini ein almenn høgtíð í India, hóast bert 3% av indarum eru kristnir. Í India hava flestu skúlar jólaferiu. Í India verða Jólini nevnd “Bada Din” – hin stóri dagurin. Jólamaðurin er rættuliga ókendur í India. Og var tað ikki fyrr enn um aldarskiftið, at Jólamaðurin byrjaði at blíva kendur í India. Men enn er hann langt frá líka væl umtóktur, sum aðrastaðni. Men tey handilsligu jólini byrja at gera innrás í India. Jólini verða eisini alment hildin á indisku forsetaborgini, sum nevnist Rashtrapati Bhavan.





















